

# Islam

# Islam

- Islam er átrúnaðurin hjá muslimum
- Sambært teimum var Adam fyrsta menniskja, fyrsti muslimur og fyrsti profetur
- Muhammed er seinasti og størsti profeturin






# Muhammed

- Borin í heim í Mekka í 570 (í dag Saudiarabia)
- Foreldrini doyðu, áðrenn hann var hálvvaksin
- Búði hjá pápabeiggjanum
- Fór í læru hjá ríku keypmanseinkjuni Kadidja
- Tey gjørdust góð og giftust (verður múgvandi)



# Tátíðin

- Arábar høvdu nógvar gudar
- Størstur var Allah, skaparin
- Allir arábar vitjaðu Mekka eina ferð um árið
- Muhammed var hugtikin av kristindóminum og Jesusi, sum frelsti fólk
- Eingilin Gabriel vísti seg fyri honum og gjørdi hann til profet




# Muslimska árið

- Árið lagar seg eftir mánanum
- 12 mðr eru við 29 ella 30 døgum
- Árið er 354 dagar
- 1 mðr byrjar, tá ið ein rætttrúgvandi muslimur hevur sæð nýmánan (tendring) á luftini.
- Okkara kalendari eitur gregorianski kalendarin.
- Í ár 20874 fer muslimski kalendarin at yvirhála okkara

- Allah merkir Gud á árabiskum

# Mótstøða

- Muhammed fekk mótstøðu, men helt fram at prædika
- Segði, at bert ein gudur var til, Allah, og at hann var profetur hansara
- Í 622 flýddi Muhammed til Medina
- Týdningarmikil hending, tí er tíðarrokning teirra frá hesum ári
- Muhammed doyði í 632



# Koranin



- Heilaga bókin
- Innbundin, skrivað við kalligrafi, berast í hjartahædd
- Gabriel las úr eini himmalbók, og Muhammed royndi at minnast alt uttanat
- Fekk javnan slíkar opinberingar alt lívið
- Vinirnir skulu minnast tær saman við honum
- So við og við bleiv alt skrivað niður
- Stutt eftir deyða hansara blivu niðurskrivaðu brotini savnað í eina bók, Koranina
- Hon er orð Allah til muslimarnar, tískil so týdningarmikil



# Koranin

- Koranin er í kapitlum, 114 í tali
- Hon er á arábiskum
- Fleiri muslimar royna at læra seg hana uttanat
- Ein onnur bók er Sunnain, tað er alt, ið Muhammed hevur gjørt og sagt





# Trúargreinar

- Verða bólkað í tveir partar
- Sunnimuslimar: halda fast við Sunna, sum er kunnleikin um, hvussu Muhammed livdi (85%)
- Shiamuslimar: hava serliga útvaldar leiðarar at útleggja innihaldið í Koranini. Teir fylgja niðurstøðunum, sum leiðarin kemur til (15%)






# Mekka

- Heilagi býurin hjá muslimum
- Muhammed hertók hann í 630
- Kabain er bygningur á skapi sum ein terningur
- Ísmael og Ábraham høvdu bygt hann til bønarstað
- Ábraham átti Ísmael við trælkvinnuni Hágar. Hann verður roknaður sum ættfaðir at arábum
- Hildið var, at Kabain og Mekka vóru miðjan í heiminum
- Muslimar skulu í minsta lagi eina ferð í lívinum til Mekka, venda ímóti Mekka, tá ið teir biðja, verða jarðað við andlitinum ímóti Mekka





# Tær fimm súlurnar




- Rætttrúgvandi muslimar skulu vísa sína trúgv við at halda ávísar átrúnaðarligar siðir og reglur
- Givnar av Gudi
- Súlurnar eru trúarjáttan, bøn, føsta, olmussa og pílagrímsferðir

# Trúarjáttan




- Á arábiskum eitur tað shahada
- *Tað er bert ein gud, Allah, og Muhammed er profetur hansara*
- Skal sigast minst eina ferð í lívinum. Hoyra onnur teg siga hana, kanst tú kalla teg muslim
- *"La ilah illa Allah, Muhammad rasoolu Allah"*
- Verður teskað í oyrað á nýføðingum
- Er við, tá ið kallað verður til bøn

# Bøn

- Bøn eitur salah á arábiskum
- 5 bønir skulu biðjast hvønn dag
- Ein fyri dag, ein beint eftir middag, ein miðskeiðis seinnapart, ein við sólsetur og ein um kvøldið
- Fríggjadag fara teir í moskuna
- Imamur leiðir bønina
- Kvinnur avgera sjálvar, um tær fara við






# Føsta

- Eitur salum á arábiskum
- Fasta ofta av sínum eintingum
- Skulu fasta níggjunda mánaðin hjá muslimum
- Eitur ramadan, sum eisini er navnið á føstuni
- Varir í ein mðr
- Kunnu hvørki eta ella drekka frá sólarrisi til sólseturs

# Olmussa



- Eitur zakah á arábiskum
- Teir trúgva, at Allah gevur teimum vælferð: ognir og pening
- Teir geva burturav, tí á henda hátt takka teir Allah fyri gávurnar
- Lata ofta ein 24. part av síni ogn og inntøku eina ferð um árið

# Pílagrímsferð



- Eitur hadsj á arábiskum
- Fara, um til ber, minst eina ferð í lívinum til Mekka
- Latnir í einfaldan, hvítan búna, áðrenn komu til Mekka
- Eins klæði bera boð um, at øll eru eins





# Imamur

- Er tann, sum leiðir bønina í moskuni
- Hevur ikki tørv á serligari útbúgving fyri at leiða bønina
- Teir, ið kunnu vera imamar eru: týdningarmiklir, átrúnaðarligir, muslimskir leiðarar, teologar og lógarkønir



# Moska

- Moskan týdningarmiklasti karmurin um trúnna
- Fleiri rúm eru í moskunum, men eitt stórt er í miðjuni, sum biðið verður í. Kallast musalla
- Eingi sitipláss. Teppi á gólvinum. Venda ímóti Mekka
- Lata seg úr skónum og vaska sær um føturnar
- Kvinnur og menn eru hvør sær
- Hava talarastól, sum er eitt sindur hægri enn gólvið
- Flestu moskur hava eitt torn, sum kallar til bøn
- Ongar myndir í moskuni. Ikki loyvt at avmynda Allah og Muhammed. Tað er halgibrot
- Verða eisini brúktar sum savningarstað t.d. eftir ramadan

# Muhammedteknarin

- Kurt Westergaard
- 2005 teknaði hann Muhammed
- Drápsroyndir
- Doyði 2021






# Føðing

- Barn er gáva frá Allah
- Verður uppalt at verða arbeiðssamt og ábyrgdarfult
- Islamska bønin verður teskað í vinstra oyra
- Barnið fær navn, tá ið tað er 7 dagar gamalt
- Veitsla hildin
- Hárið rakað av og vigað. Vektin verður latin í silvuri til tey fátæku
- Øll muslimsk nøvn merkja okkurt
- Tá ið barnið er fimm ár, endurgevur tað tær fyrstu reglurnar úr Koranini á arábiskum
- Mong eita eftir Muhammed ella onkrum í ætt hansara
- Dreingjabørn verða ofta umskorin og summastaðni gentur eisini.
- Ikki semja, um Muhammed var umskorin. Koranin sigur als einki um, at gentubørn skulu umskerast. Hetta er heldur grundað á siðvenju



# Umskering

- Genturnar verða umskornar sambært siðvenju serliga í afrikanskum londum
- Skorið verður av kvinnuligu kynslutunum og seymað aftur
- Ójavnt, hvussu mikið verður tikið burtur






Umskering

# Umskering



# Umskering



Foreskin
(Layer of Skin Covering Glans)
Glans
Before Circumcision
After Circumcision

# Umskering








# Umskering - gentur

# Skiftið frá barni til vaksin

- Gera ikki nakað serstakt burturúr
- Læra í uppvøkstrinum, hvat ein góður muslimur er
- 7 ára gomul fara tey í Koranskúla í moskuni
- Læra at lesa Koranina, sum er á arábiskum
- Tá ið barnið er um 13 ár, verður væntað, at tey eru sjálvstøðug átrúnaðarliga
- Stórur dentur verður lagdur á tær fimm súlurnar og trúarjáttanina, bønina og føstuna
- Sum tannáringar sleppa dreingir og gentur ikki at vera saman uttan vaksin eru til staðar.





# Hjúnalag

- Sum oftast avtala foreldrini hjúnalagið
- Sharialógin gevur tó brúður og brúðgómi rætt til at siga nei til tann, sum foreldrini hava valt
- Foreldrini avtala heimanfylgju undan brúdleypinum
- Undir vígsluni sita brúður og brúðgómur í hvør sínum rúmi. Hava hvør sítt vitni
- Imamur ella annar muslimskur maður lesur úr Koranini.
- Vitnini bera svarini ímillum rúmini
- Biðið verður fyri, at tey verða eins eydnurík og Muhammed og Khadidja



# Brúdleyp

- Vara ofta í tríggjar dagar
- Fyrsta dagin halda tey veitslu hvør sær við vinum og familju
- Annan dagin leiðir brúðgómurin brúðrina í heimið
- Triðja dagin tekur brúðurin ímóti vinum og familju í nýggja heiminum
- Koranin loyvir manni at hava 4 konur, men bert um allar hava somu kor.
- Flestu lond loyva tó ikki fleiri konum
- Hjúnaskilnaður er bert loyvdur sum síðsta loysn

# Slør

- Koranin sigur einki um, at kvinnur skulu vera í sløri/turriklæði
- Tó verður væntað, at tær klæða seg sømiliga
- Menn kunnu hava beran yvirkropp
- Kvinnur skulu ikki vísa hár, armar og bein og ikki vera í klæðum, sum sita ov tætt at kroppinum






# Deyði

- Siðirnir eru bundnir at lívsákoðanini og lívsførsluni
- Er andlátið væntað, so er gott, at tann, sum skal hiðani, fær fyrigeving fyri gerðir sínar og viðurkennir, at tað er bert ein gudur, Allah
- Megnar tann doyggjandi ikki hetta, eiga tey nærmastu at gera tað
- Líkið verður so vaskað. Maður vaskar manni, og kvinna vaskar kvinnu
- Verða ballað í hvítt klæði
- Helst jarðarferð sama dag
- Verða ofta borin heldur enn koyrd
- Hava nógvastaðni egnan gravstað, tí skulu líta ímóti Mekka
- Allah dømir tey eftir lívsførslu.
- Tveir einglar hava ført roknskap yvir góðar og óndar gerðir. Teir handa Allah roknskapin, so avger hann, hvør fer hvar



# Útbreiðsla

| | Muslim population | |
|---|---|---|
| | 2020 | 2100 |
| Sweden | 8.3 % | 34 % |
| Norway | 5.0 % | 15 % |
| Denmark | 5.4 % | 9 % |
| Finland | 1.7 % | 18 % |

- Tá ið talt verður, hvussu nógvir muslimar eru, verður ikki hugsað um, teir eru virknir ella ikki.
- Uml. 1.6 milliardir muslimar = uml. 23 %
- Næststørsti átrúnaðurin
- Nógv flestu búgva í Asia (60 %)
- Bert 20 % í Miðeystri
- Hoyra saman um allan heim í einum trúarfelagsskapi, sum eitur Umma
- Í Evropa liva muslimar sum minnilutar við teimum trupulleikum, sum hoyra til har t.d. mál, trúgv, siðvenju og liviháttur
- Teir koma úr ymsikum londum og tulka Koranina og Sunnaina ymiskt